


*Samgongan ætlar ikki at játtanin hjá Strandferðsluni næsta ár skal fylgja teimum príshækkingum, sum eru á veg og tað fer at fáa avleiðingar fyri ferðaætlanina og prísirnar og ferðaseðlum*

# Færri túrar og dýrari ferðaseðlar næsta ár

**SKERJING** Vandi er fyri, at sparingar fara at raka Strandferðsluna hart næsta ár

Áki Bertholdsen

Tað er nógv, sum bendir á, at tænastan frá Strandferðsluni fer at versna munandi næsta ár.

Í hesum sambandi bæði vandi fyri, at skip fara at sigla færri túrar og at ferðaseðlaprísirnir fara at hækka.

Bogi Mortensen, stjóri á Strandferðsluni, sigur, at hetta kann gerast avleiðingin, fær Strandferðslan ikki meiri pening á fíggjarlógini fyri næsta ár, enn tað, sum landsstýrið hevur skotið upp.

Landsstýrið hevur skotið upp at játta Strandferðsluni 125,1 milliónir næsta ár og tað er akkurát tað sama sum í ár.

Hinvegin er nógv, sum bendir á, at prísirnir fara at hækka næsta ár.

Landsstýrið uppskotinum til fíggjarlóg, at nú í heyst er oljuprísurin er 40 til 60 oyru hægri fyri liturin enn hann var, tá ið fíggjarlógin fyri í ár varð gjørd.

Heldur hetta prísstøðið sær, fer tað at kosta Strandferðsluni minst 5 milliónir krónur eyka næsta ár, tí onki er lagt upp fyri príshækkingum.

Landsstýrið hevur heldur ikki lagt upp fyri, at sáttmálar við veitarar á Oyggjaleiðum og Bygdaleiðum eru prístalsviðgjørdir so dýrkar olja og hækka lønirnar, kostar tað eisini Strandferðsluni.

Landsstýrið hevur heldur ikki lagt upp fyri, at kostnaðurin av at hava gomul skip í sigling veksur ár fyri ár.

### Sjey-átta milliónir

Bogi Mortensen staðfestir, at ætlanin hjá samgonguni at leggja eitt serligt avgjald á oljuna, fer at kosta Strandferðsluni aðrar 1,5 til 2 milliónir.

Samstundis hevur stovnurin eina lønarútreiðslu upp á 60 milliónir um ár. Tað merkir, at fyri hvørt prosent, lønirnar hækka, kostar tað Strandferðsluni 600.000 krónur.

Tí veldst eisini nógv um, hvat úrslitið av lønarsamráðingunum á almenna arbeiðsmarknaðinum, sum eru nú, enda við.

Samgongan hevur nevniliga gjørt greitt, at hækka almennu lønirnar, skulu tilsvarandi sparingar gerast, tí politiski málsetningurin er, at útreiðslurnar til lønir skal ikki hækka.

Stjórin á Strandferðsluni váttar tí, at tað er rættiliga skjótt, at Strandferðslan noyðist at spara 7 til 8 milliónir næsta ár.

Og tað fer at merkjast munandi í teirri tænastu, stovnurin veitir.

- Strandferðslan hevur bara tveir møguleikar fyri at spara nakað sum veruliga munar og tað er at sigla fleiri túrar og at seta prísin á ferðaseðlum upp, sigur Bogi Mortensen.

Akkurát, hvussu hann sær myndina fyri sær, vil stjórin ikki siga so nógv um, tí enn eru nógv ókend viðurskifti.

Men einføld høvuðrokning sigur kortini, at skal ein sparing upp á sjey ella átta milliónir finnast í ferðaætlanini og og prísinum á ferðaseðlum, verður talan um munandi færri túrar og eina hampuliga príshækking.

*aki@sosialurin.fo*

## Seta fólk at fáa føroyingar at eta sunt

Næsta ár er alment kostár og tá skal serligur dentur leggjast á átøk, sum kunnu bøta um kostvanarnar hjá føroyingum.

Tað er landsstýrismaðurin í heilsumálum, sum stendur fyri tiltakinum og millum annað fer tað at liggja á Fólkaheilsuráðnum at skipa fyri ymsum átøkum í hesum sambandi.

Tí ætlar fólkaheilsuráðið at seta tveir kostserfrøðingar í starv.

Teir skulu arbeiða hálva tíð hvør og sostatt er talan um eitt ársverk tilsamans

Talan skal vera um tvey fólk við serligum kunnleika til matfrøði og fólkaheilsu og uppgáva teirra verður at finna uppá og fremja ymisk átøk, sum hava til endamáls at gera matvanarnar í Føroyum so heilsugóðar sum til ber.

Tí skulu umsøkjarar hava serligan kunnleika til heilsugóðan kost, umframt at teir skulu hava skapandi evni og góð samskiftis- og samstarvsevni.

## Arbeiðsloysið ímillum ung nógv minkað

Talið á teimum ungu, sum ganga arbeiðsleys, er munandi minkað seinastu tíðina.

Tað upplýsti Johan Dahl, landsstýrismaður í vinnumálum fyri løgtinginum mikudagin.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen, løgtingskvinna, spurdi hann, hvat hann ætlar at gera fyri at basa ungdómsarbeiðsloysinum.

Johan dahl svaraði, at fyrr í ár setti ein arbeiðsbólkur nøkur uppskot fram um, hvussu ungdómsarbeiðsloysið kann basast.

Eitt uppskot var, at øll, sum eru skikkað, skulu sleppa undir útbúgving.

Tað er eitt uppskot, sum samgongan hevur raðfest og úrslitið av tí er, at í ár eru eini 500 fleiri lesandi í Føroyum, enn tað vóru í fjør.

Hann sigur, at hetta hevur ført til, at talið á teimum 16-24 ára gomlu, sum ganga fyri einki, er munandi fallið.

Hann vísti á, at seinasta uppgerðin frá ALS yvir arbeiðsleys ímillum 16 og 24 ár, er , at talið fallið úr 341 arbeiðsleysum ungdómum í mars niður í 179 í oktober.

- Tað er onki at ivast í, at nógv av hesum hava tikið av tilboðnum um at fara undir útbúgving.

Landsstýrismaðurin upplýsir eisini umboð fyri ALS hava verið norðurlendskari ráðstevnu um ungdómsarbeiðsloysi og skipanin hevur eisini skipað fyri evnisdegi fyri ung arbeiðsleys í aldrinum frá 18-24 ár.

Í næstum fer ALS eisini at seta fólk í starv at ráðgeva um ungdómsarbeiðsloysi.

Bergtóra Høgnadóttir Joensen var ikki hugtikin, tí hon staðfesti, at uppskotið um at lata allir skikkaðar næmingar sleppa inn á miðnámsskúla, varð gamalt og tí vónaði hon at síggja onnur átøk frá samgonguni.

Hans Pauli Strøm, løgtingsmaður, vil hava ungdómsarbeiðsloysi í síni heild til orðaskifti í Løgtinginum og tað tók landsstýrismaðurin undir við.

Annars vísti hann á, at ALS arbeiðir við málinum og har eru nøkur tilmæli á veg, sum ikki enn eru komin á hansara borð.